# Rógvingin bítir frá sær

Kajakkrógving er í mangar mátar ein bítandi ítrótt. Tað kann viðvhørt verða bítandi kalt, men samstundis verður tú púrasta bitin av rógvingini. Mikukvøldið vitjaðu vit í Álakeri, har tríggir rógvarar fyrireika seg til altjóða kapping, sum verður í Grønlandi um knappan mánað



**Jákup varð púrasta bitin av ítróttini fyri einum sjey árum síðani. Hann hevur róð støðugt síðani tá, og eisini hevur hann bygt tvær kajakkir sjálvur**

*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

Gamla neystið hjá Havnar Róðrafelag verður ikki bert nýtt til kappróðrabátar felagsins longur. Gaman í, gamli Havnarbáturin stendur framvegis í. Eisini sæst gamli Háskúlabáturin, sum fyri gott tíggju árum síðani broytti navn til Bláskel, eftir at næmingar á Venjingarskúlanum høvdu yvirtikið hann.

Tað, sum helst er mest forvitnisligt við neystinum í dag, er, at uppi undir vaðingini og fram við vangunum í neystinum eru hópin av kajakkum skoraðar fastar. Kajakkir, sum seinnu árini eru vorðnar ein alt meira vanlig sjón úti á vágni.

**Ítriv og ítrótt**
Onkur vildi kanska mett hetta sum eitt stuttligt, og kanska spennandi frítíðarítriv, men hetta er bara partvíst rætt.

Talan er so sanniliga eisini um eina ítrótt, og seinna partin av juli mánaði, fara tríggir føroyskir rógvarar at kappast í Grønlandi, har grønlendska meistaraheitið í kajakkrógving stendur á skránni. Teir tríggir eru Jákup Jacobsen, Páll Olaf Jacobsen og Thomas Davidsen. Eisini var ætlanin, at ein fjórði føroyingur, Jan Egil Christiansen, skuldi vera við á ferðini, men hetta varð kortini av ongum.

Jákup, greiðir frá, at hetta er komið í lag, eftir at teir hava fingið eina innbjóðing úr Grønlandi um luttøku. Áður hevur tað verið soleiðis, at tað bert hava verið grønlendingar, sum hava havt møguleika at luttaka í kappingini, men í ár er hon so fyri fyrstu ferð opin fyri altjóða luttøku.

**Øðrvísi kapping**
Hóast fólk kring allan heimin rógva kapp í kajakkum, so er kappingin í Grønlandi kortini eitt sindur øðrvísi. Her verður nevniliga ikki róð við teimum árum, sum vit vanliga síggja í sjónvarpinum, men við upprunaligu grønlendsku árunum. Bløðini eru væl minni, enn stóru bløðini á plastárunum, sum annars verða nýttar, og



**Fyrsta takið er sjálvandi at gera alt klárt til at fara. Her tøma teir vatn úr kajakkini hjá Thomas**

heldur ikki er árin snarað, soleiðis sum vit síggja tað í sjónvarpinum.

Í Grønlandi verða luttakararnir bólkaðir í tríggjar bólkar, sum tó allir skulu nýta grønlendsku árarnar: Grønlendingar í grønlendskari kajakk, útlendingar í grønlendskari kajakk og so útlendingar í kappróðrakajakk.

Munur er nevnliga á eini grønlendskari kajakk og so teimum, sum róð verður við á Olympisku leikunum. Kappróðrakajakkirnar eru vanliga stoyptar í plasti ella glasfipuri, og eru yvirhøvur bygdar eftir meira vísundaligum fortreytum, so tær kunnu ganga best gjørligt.

Grønlendska kajakkin er hinvegin bygd úr træi og so klødd við antin kópaskinni ella segldúki. Sniið er eisini nakað øðrvísi enn á plastkajakkunum, og hetta viðførir eisini, at hon er nógv róligari í sjónum.

Undir kappingini skal Jákup royna seg í bólkinum við grønlendskari kajakk, meðan Páll Olaf og Thomas skulu rógva í bólkinum við kappróðrakajakkum.

**Verður bitin**
Jákup, sum er tann av teimum, sum hevur drúgvastu royndirnar á økinum, greiðir frá, at tað var meðan hann las í Danmark, at hann fekk áhuga fyri ítróttini.

Nakrir grønlendingar vóru eisini í holt við lestur, og tað gjøgnum hesar, at Jákup so við og við fekk kunnleika til rógvingina.

- At enda varð eg fullkomuliga bitin av hesum, og tað havi eg verið síðani, greiður Jákup frá. Hann leggur í hesum sambandi afturat, at tað er gjøgnum ein av hesum grønlendingum, at teir nú eru bodnir við til kappingina í Grønlandi.

Seinastu sjey árini hevur hann sostatt róð, um ikki dagliga, so í øllum førum javnan, og einki er at siga til, at tað er vorðið hugaligari, nú teir eru fleiri, sum kunnu venja saman.

Vanligi teinurin teir rógva, er út móti Glyvursnesi ella til hoyvíkshólmin og aftur, men eisini hava teir verið onkrar longri túrar. Hóast kajakkirnar síggjar lítlar út, so rúmast bæði matur, telt og annað viðføri í teimum, og um summarið hava teir verið útferðir til eitt nú vestmannabjørgini, Nólsoy og Hestoynna, og allir eru teir samdir um, at hetta eru nakrar ótrúliga spennandi og vakrar ferðir.

**Trygdin er í lagi**
Onkur vildi kanska hildið, at tað mátti verið vandamikið at farið slíkar ferðir við somikið lítlum bátum, men hesum eru teir tó als ikki samdir í. Kajakkirnar liggja sera væl i sjónum, og harumframt eru teir ílætnir klæðum, sum kunnu verða lívbjargandi, um so er, at okkurt óhapp skuldi borist á.

Teir leggja tó dent á, at slíkar ferðir fara teir ongantíð einsamallir. Verður róð einsamallir, er fjarstøðan inn til land ongantíð hin stóra, tí sum teir siga: - Tað er so einfalt, at nærri tú ert við land, styttri er at svimja.

Vandin fyri at koppa úr kajakkini er tó heldur ikki hin stóri. Rógvarin er so at siga skoraður niður í rúmið, og skuldi tað hent, at kajakkin koppar, ber altíð til at mala seg upp aftur, og hetta sýna teir okkum eisini fleiri dømi um niðri í Álakeri. Bert til stuttleikar melur Jákup nakrar ferðir runt í sjónum, um tað sigast til stuttleikar, tá vatnið einans er sjey hitastig. Tað er nú ikki so kalt halda teir, og vísa á, at í Grønlandi eru tað bert tvey hitastig í sjónum.

Jákup sigur, at umframt vátdrakt og onnur hóskandi pløgg, er trygdin við kajakkini tann, at tú alla tíðina er fastur. Í øðrum førum er trygdin aloftast tann, at tú sleppur úr bátinum, um hann hvølvist, soleiðis at til ber at svimja upp. Her er júst tað øvugta galdandi, soleiðis at tú altíð er fastur, og fært snarað teg upp á rættkjøl.

**Skræaddaraseymað**
Kajakkina, sum Jákup rør í, hevur hann bygt sjálvur, og er talan um eina grønlendska kajakk, sum eisini verður kallað havkajakk. Bondini og ringarnir í hesum eru úr ask, meðan stokkarnir eru úr furu, og so er beinagrindin klødd við segldúki.

Hálvan fimta metur long og einans 52 sentimetrar breið, sær hon ikki út av nógvum. Vektin er einans fimtan kilo, men hóast hetta, er einki at ivast í, at talan er um eitt sjógott far.

Spurdur, at tað ikki er nógv stríð av at byggja eina slíka kajakk, heldur Jákup, at tað kann man kanska siga. Einir 100 arbeiðstímar munnu vera nýttir til endamálið, men talan hevur verið um sera hugaligar tímar. – Eg havi soleiðis gingið og putlast gjøgnum veturin. Ein tíma her og tveir har, og tað haldi eg bara hevur verið stuttlig og spennandi.

Sjálvandi ber eisini til at keypa kajakkir, men i báðum førum er galdandi, at kajakkin verður bygd til eigaran.

- Tað er eins og við føroyskum klæðum. Skalt tú hava eina kajakk, ert tú noyddir at passa hana so hvør, sum hon verður bygd, greiða teir frá.







**Ógvusligt sær tað út, tá jákup vísir myndamanninum, hvussu ein ger, um óhapp hendir, soleiðis at kajakkin koppar. Fyrst fer hann við heysinum fremst undir kav. Á næstu myndini vendir alt á høvdinum, og á seianstu myndini er hann aftur komin undan kavi. Einfalt og lætt ella hvat?**

# Kappingin hevur fleiri endamál

Nógvir og langir teinar skulu rógvast, teri dagarnar, sum kappast verður í Grønlandi

Sum nevnt aðrastaðni í síðuni, so skulu tríggir føroyskir kajakkrógvarar til Grønlands at royna seg.

**Læra tíðliga**
20. juli fer ferðalagið av landinum, og umvegis Danmark, verður kósin síðani sett móti Grønlandi.

Sjálv kappingin byrjar 24. juli og síðani verður hildið á fram til 31. juli, tá seinastu kappingarnar standa á skránni.

At grønlendingar læra rógvikynstrið frá barnsbeini av, er eyðsæð. Sambært kappingarskránni, er yngsti aldursbólkurin børn 4-6 ár, og kappast hesi bæði rógving og í nýtslu av veiðureiðskapi.

Føroysku luttakararnir luttaka tó sjálvandi í kappingunum fyri vaksin, og hesi hava so sanniliga eisini sítt at takast við.

**Nógvir kilometrar**
Longsti teinurin, sum róð verður, er einar 40 km langur, og hetta í sjálvum sær, er helst nóg mikið til at faa tey flestu at setast afturá og takka fyri seg.

Kappast verður tó eisini í styttri teinum, heilt niður í 1 km, og harumframt eru eisini kappingar fyri lið, kappingar í vendingum o.s.fr.

Sum vera man, so eru føroysku luttakararnir sera spentir at royna seg í kappingini, men teir leggja afturat, at teir vita einki um, á hvørjum støði hinir rógvararnir eru.

**Teir tríggir, Páll Olaf, Jákup og Tohmas, í fullari ferð undir venjing. Skjótt verður talan um rættuliga kapping hjá teimum**



- Hetta er jú fyrsta ferðin, at kappingin er opin, so vit hava ongar tíðir at halda okkum til, siga teir tríggir. Teir leggja tó afturat, at tað at fáa eina góða endastøðu ikki er tað týdningarmesta hjá teimum við luttøkuni.

– Tað er ein stór upplivingi, bara at kunna vera við, og harumframt betrar hetta eisini um møguleikan fyri øktum samstarvið, greiðir Jákup Jacobsen frá.

Hóast hetta, so hava teir sjálvandi vant dúgliga seinastu tíðina. Í nakrar mánaðir hava teir verið úti einar fimm ferðir um vikuna, og vanliga verður vant í ein til tveir tímar. Longsti teinurin, sum teir higartil hava róð út í eitt, hevur verið til Kaldbaks og aftur í Álaker. Hetta tók teimum góðar tríggjar tímar, so einki er at taka seg aftur í, at ferðin á kajakkunum er á eini góðari leið.

**Økt samstarv**
Ætlanin er annars, at komandi árini skal eitt sokallað netverk byggjast upp, serliga í Norðanlondunum og Canada, soleiðis at samskiftið innnan ítróttina kann betrast.

At kappingin í Grønlandi nú er opin, ístaðin fyri bert at vera fyri grønlendingar, er eitt stig á leiðini, men ætlanin er at víðka nógv um samstarvið í framtíðini.

Við hesum verður eitt nú nógv lættari at finna fram til, hvussu ein ber seg at, um ein t.d. vil til Finnlands at rógva á vøtnunum har, ella um onkur svii hevur hug at rógva á føroysku firðunum. Ætlanin er í stuttum, at tú altíð skalt vita, hvaðar tú skalt venda tær, um áhugi er at fara aðrastaðni at rógva. Upp á longri sikt er so ætlanin, at hetta eisini skal kunna nýtast í samband við ferðavinnuna, men enn er so einki fastlagt hesum viðvíkjandi.

**Takka fyri hjálpina**
Fyrst og fremst er tað grønlandsferðin, sum teir tríggir hava í huga, og í hesum sambandi vilja teir fegnir veita eina tøkk til stuðlarnar, sum eru Grunnurin Reykjavík-Nuuk-Tórshavn, Skipafelagið, Ballslev, Tryggingarfelagið og Royal-Arctic Lines.

Einki er at taka seg aftur í, at talan er um eina sera kostnaðarmikla ferð, og føroysku luttakararnir eru sannførdir um, at uttan stuðulin, sum teir hava fingið, hevði tað verið nærum ógjørligt hjá teimum at farið undir hetta.

# Áhugin er vaksandi

Áhugin fyri virkseminum hjá unga felagnum, hevur verið alsamt vaksandi undanfarnu trý árini

Havnar Kajakkfelag hevur trý ár á baki, og hesa tíðina, sum felagið hevur verið til, hevur áhugin fyri ítróttini verið alsamt vaksandi.

**16 kajakkir**
Jákup Jacobsen, sum er ein teirra, sum so at siga dagliga er úti á vágni, sigur, at tað javnan kemur fyri, at eitt ella tvey fók koma oman at royna hesa ítróttina.

Um tú bert er forvitin, og ætlar at royna hetta eina tíð, nýtist hetta ikki at vera nøkur stór útreiðsla.

Í alt eru 16 kajakkir í neystinum, har av felagið eigur tær fimm, so tað ber til hjá áhugaðum at læna hesar eina tíð. Eisini vátdrakt v.m. eru til taks í neystinum, so har er snøgt sagt einki at hugsa um.

Í longdini vil man kanska eiga sína egnu kajakk, og tá verður so talan um eina útreiðslu. Sjálv kajakkin kostar einar 10.000 – 20.000 kr. at keypa, og harumframt skulu so roknast útreiðslur til klædnapløggini, góðar 2.000 kr.



**Í lýkkuni mikukvøldið gera teir tríggir seg út til enn eitt venjingarkvøld niðri í Álakeri, har felagið heldur til**

Kanska heldur onkur, at hetta ljóðar av nógvum, men os hevur tú eisini eitt sjófar, sum heldur í eini 30 ár!

Um summarið verður róð niðri í Álakeri, út í Sandágerð, og so eisini móti Glyvursnesi og Hoyvíkshólmanum, og Jákup sigur, at øll, sum hava áhuga, eru væl komin oman at royna seg.

**Eisini innandura**
Vilt tú heldur royna teg undir tryggari umstøðum, ber hetta eisini til. Um veturin verður nevniliga vant uppi í Svimjuhylinum. Fyrimunurin er tá sjálvandi, at ymsu trygdarvenjingarnar kunnu roynast undir tryggum umstøðum, og so sjálvandi at vatnið tá er heitari, og tað var serliga hetta seinna, sum vit báðir, myndamaðurin, hugsaðu um, tá vit søgdu nei takk til at royna okkum niðri í Álakeri.